## Drekka kranavatn á Oyggjaleikunum

Fyrireikararnir av Oyggjaleikunum hava í bóklingi – í samband við leikirnar Álandi um slakar tveir mánaðir – mælt til, at allir íðkarar, hjálparar og áskoðarar drekka vatn úr krananum, heldur enn at keypa vatn í fløskum. Endurfyllingar fløskur verða lætnar øllum luttakarunum á oyggjaleikunum. Grundgevingin fyri, at mælt verður til at drekka vatn úr krananum, er, at tað er meiri umhvørvisvinarligt, og at vatni á Álandi er gott og kann drekkast uttan at heilsuvanda.



## Hjún standa á odda fyri VÍF

Heimasíðan hjá VÍF skrivar, at hjúnini Svanna Hanusardóttir og Kári Mortensen skulu venja besta kvinnuliðið í Vestmanna komandi árið. Svanna Hanusardóttir og Kári Mortensen hava drúgvar royndir í føroyskum hondbólti. Hanusardóttir var millum mest týðandi leikararnir hjá Neistanum í sjeyti – og áttati-árunum, og hon hevur eisini roynt seg í bestu donsku hondbóltskappingini. Mortensen, sum hevur slitið sínar barndómsskógvar í VÍF, var leingi millum bestu hondbóltsleikararnir í Føroyum. Seinastu trý árini hevur hann staðið á odda fyri besta mansliðnum hjá KÍF.

## Alt farið rætt fram

**Julianna Klett, sum er ein av limunum í úttøkunevndini í golf, sigur seg skilja væl, at Ragnar Isaksen er vónbrotin, men at úttøkan er gjørd eftir, hvørjir spælarar hava besta handikappið**

GOLF
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Formaðurin í Tórshavnar Golfklubba, Jógvan Amonsson, sigur um orsøkina til, at Ragnar Isaksen ikki er úttikin til komandi Oyggjaleikirnar á Álandi, at hann ikki hevur latið nakað skorikort inn, sum kundi rættvísgera eina møguliga úttøku.

– Tú mást kunna prógva, at tú spælir upp til títt handikapp, og av tí at vit ikki hava fingið nakað skorikort frá Ragnari, livir hann ikki upp til treytirnar fyri at verða úttikin, sigur Jógvan Amonsson, sum tó viðgongur, at úttøkan skuldi verið avgreidd fyrr.

Hann vísir annars til Juliannu Klett, sum er ein av limunum í úttøkunevndini í golfi. Hon sigur, at pláss var bara fyri fýra spælarum til kappingina hjá monnum á Álandi, og tí mátti gangast eftir reglunum um handikapp fyri at finna bestu spælararnar at senda avstað til leikirnar.

– At tú vinnur kappingar, er ikki tað sama, sum at tú hevur besta handikappið. Og í úttøkuni til Oyggjaleikirnar á Álandi hava vit brúkt handikappið sum metingargrundarlag. Tí er Ragnar ikki tikin út, sigur Julianna Klett.

– Eg veit, at hann er vónbrotin, tí hann ikki er úttikin, og tað skilji eg eisini væl. Men vit hava gingið eftir reglunum, so her er alt farið rætt fram. Tað er bara ikki nóg mikið at vinna kappingar, tí tú mást eisini hava eitt nóg gott handikapp.

# Ikki nóg gott at vera føroyameistari í golf

**Ragnar Isaksen, sum var ein av trimum føroyskum golfspælarum á Oyggjaleikunum á Rhodos, verður ikki at síggja á Álandi í summar. Hóast hann bæði er føroyameistari og hevur vunnið stóru Tórshavn Open-kappingina, kennir hann seg settan til síðis**

GOLF
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Í flestu ítróttargreinum er føroyameistarin vanliga hann, ið verður hildin at vera tann besti og dugnaligasti, og hevur hann haraftrat vunnið aðrar kappingar, er vanliga eingin sum helst ivi um tað. Men soleiðis er ikki í golf, nú úttøkan til Oyggjaleikirnar á Álandi í summar er gjørd.

Ragnar Isaksen, sum bæði er føroyameistari og hevur vunnið stóru Tórshavn Open-kappingina, ið gongur yvir tríggjar dagar, er ikki tikin út, og sostatt verður hann ikki við á Álandi. Hann var annars ein av trimum føroyskum golfspælarum, sum vóru við til Oyggjaleikirnar á Rhodos í 2007.

– Soleiðis sum reglurnar vóru, skuldi eg sjálvandi verið millum spælararnar, sum fór til Álands í summar, tí eg havi snøgt sagt verið tann besti av teimum, sum hava spælt í Føroyum, sigur Ragnar, ið vísir á, at eftir kappingina um føroyameistaraheitið og Tórshavn Open-kappingina komu aðrar reglur.

– Nú var kravið, at tú skuldi lata trý skorikort inn í november mánaði, og síðani var úttøkan gjørd eftir teimum úrslitunum. Men eg gjørdi beinanvegin vart við, at júst í november kundi eg slett ikki vera við, tí eg var blivin handilsleiðari og hevði ikki stundir at spæla júst tá. Tað skýmir eisini so tíðliga tá, at hevur tú eitt vanligt arbeiði, ber slett ikki til at spæla í november.

### Ójavnar treytir

Síðani hevur ein av hinum úttiknu spælarunum sjálvur fortalt Ragnari, at hann var tikin út, grundað á skorikort frá august og september, tí hann heldur ikki hevði stundir at spæla í november.

– Um eg kundi gjørt tað sama, so hevði eg uppaftur meira sannførandi sloppið við, tí júst í august og september spældi eg tvær ferðir við 81 sløgum, sum er met, sigur Ragnar Isaksen.

Hóast Ragnar hevði bestu kappingarúrslitini at vísa á og enntá hevur sett tvey met, slapp hann ikki upp í part, og eru teir báðir, sum annars hava ligið niðan fyri hann í kappingunum, Oskar Eiriksson og Janus Norðberg, úttiknir í staðin, umframt Róa H. Christiansen og Jónfinn Thomassen, sum búgva og spæla í Danmark.

– Hetta er í mínari verð ótrúliga langt úti og óhoyrt, tí tá tað ikki er nóg gott at vera føroyameistari, dugi eg ikki við mínum besta vilja at síggja logikkin í úttøkuni. Í øllum ítróttargreinum eru tað tey bestu kappingarúrslitini og meistaraheitini, ið telja mest, tá bestu spælararnir skulu finnast, sigur Ragnar Isaksen.

– Um nakar skal takast fram um meg til eina so stóra kapping sum Oyggjaleikirnar, so má tað væl-saktans vera onkur, sum veruliga hevur verið betri enn eg. Soleiðis er tað bara ikki, og tá farið verður afturumaftur at tillaga reglurnar, so tær koma veikari spælarum til góðar, heldur enn at stimbra teir bestu, er lítið vert at kappast.



*Ragnar Isaksen hevur verið besti golfspælarin í føroysku kappingunum, men kortini er hann ikki tikin út til Oyggjaleikirnar á Álandi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Meiningsleyst

Tá Ragnar var úttikin til Oyggjaleikirnar á Rhodos, gjørdist hann bæði bilsin og fegin, men tá hann fann útav, at hann – eftir framgongd og sigrar í størstu kappingunum – ikki slapp við til Ålands kortini, gjørdist hann minst líka bilsin og haraftrat sera vónbrotin.

– At nakrir spælarar verða úttiknir, bara so teir skulu fáa ein seinasta kjans at vera við í einari kapping, sjálvt um onkur annar yngri er betri enn teir, er hvørki gott ella mennandi fyri golfspælið í Føroyum, staðfestir Ragnar.

– Tú kennir teg sum rukku, tá brúkar nógva tíð upp á golf, men kortini verður sett til víks, bara tí onkur annar hevur ein dreym um at sleppa út at kappast, sjálvt um hann ikki er nóg góður til tað.

Síðani alt hetta er hent, er Ragnar givin at spæla í Føroyum, tí álitið á tey, sum skipa fyri, er fullkomuliga fokið. Hann hevur tó góðar møguleikar at spæla, tá hann er niðri, og tað ger hann so ofta, sum tað ber honum til.